# Salt á fløgu



Fríggjadagin kemur nýggj føroysk fløga á marknaðin. Tað er sangbólkurin, Salt, sum stendur aftan fyri útgávuna

Fríggjadagin komandi gevur sangbólkurin, Salt, nýggja fløgu út. Fløgan er eitt breitt úrval av tí stíli, bólkurin hevur fingist við, gjøgnum tey seks árini hesi sjey ungu fólkini úr Eysturoynni hava vant miðvíst saman. Hon inniheldur bæði fjølbroyttan a capella tónleik og nýggjan poptónleik. Fleiri løg á fløguni eru nýggj, meðan onnur eru gomul og kend, føroysk, svensk og bretsk løg við nýggjum útsetingum. Eisini er ein kingosálmur við á fløguni.

Hesa seinastu tíðina er bólkurin vorðin mest kendur fyri sín a capella tónleik, við ymisku, men tó væl harmonerandi, røddunum og frálíku, bergtakandi útsetingunum. Tann tónleikur tey framføra er nýggjur og slóðbrótandi innan føroyska tónleikaheimin.

Salt hevur verið tvær ferðir í Fraserburg í Skotlandi til ein vikuskiftisfestival og í desemburmánaða syngja tey til eina konsert í Glasgow við heitinum »Gospelheirs and friends«.

Í sambandi við tær uttanlandsferðir Salt hevur gjørt, hava hesi ungu fólkini verið framúr væl umtókt bæði í skotska tónleikaheiminum – hetta endurspeglast í, at tey nú eru boðin við sum vinir hjá einum kendum skotskum tónleikabólki – og av teimum amerikansku bólkunum, tey eru komin í samband við. Tey fingu fyri góðum ári síðani tilboð um at fáa fløgu framleidda og marknaðarførda av plátufelag í Atlanta í Georgia, men hava valt at geva fløgu út sjálvi her í Føroyum í tøttum samstarvi við Hans Poulsen, búsitandi í Keypmannahavn. Á henda hátt kundu tey hava meiri ávirkan á, at endamálið við fløguni bleiv júst tað, tey høvdu ætlað. Hetta sigur tó onki um, at fløgan ikki verður seld bæði í Skotlandi og í Amerika, í og við, at áhugin vísir seg at vera stórur í hesum báðum londum.

Í sambandi við at fløgan kemur út, verður útgávukonsert í Kelduni í Skálafirði fríggjakvøldið, har Salt kemur at framføra løgini á fløguni umframt aðrar kendar sangir, sum bólkurin hevur sungið gjøgnum árini. Tað verður bæði a capella og tónleikur við ljóðførum. Teir, sum koma at spæla á konsertini, verða: Gunnar Guttesen, James Olsen, Bárður Háberg, Dánjal Zachariassen, Pætur Dahl Christiansen og Rúni Eysturlíð. Harafturat verður øðrvísi tónleikur framførdur í steðginum við kazoo'um, gløsum og fløskum.

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av vestri, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing. Ælingur, sum frálíður kavi og hitalagið fellur sum frálíður niður í ÷2 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷2 og+1 stig – um náttina niður í ÷4 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin minkar hann vindin niður í lot av útnyrðingi ella av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin um frostmarkið. Sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind av landnyrðing og avfall. Hitin nakað omanfyri frostmarkið.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷14 |
| Nuuk | ÷2 |
| Qaqortoq | ÷1 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | 6 |
| Aberdeen | 8 |
| London | 9 |
| Tromsø | ÷1 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 11 |
| Keypmannah. | 9 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 5 |
| Warzawa | 3 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 6 |
| Paris | 6 |
| Madrid | 11 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 12 |
| Athen | 18 |
| Malta | 16 |
| Tunis | 15 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 25 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | – |
| Sydney | – |
| New York | 12 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 21 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | – |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1000 hPa. yvir Grønlandsfjørðinum fer eystureftir og dýpist. Tað verður yvir Føroyum mikudagin.




Lágtrýstið við Føroyar fer móti Suður-Noreg og dýpist framvegis. Vestan fyri lágtrýstið rekur køld luft av norði móti Føroyum.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/11 kl. 06[00]–16/11. 06[00]. Hitin í gjár: 2,9°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,1 mm – mált frá 15/11 kl. 06[00]–16/11 kl. 06[00]
Avfallið higartil í november: 82,7 mm


GEVIÐ BLÓÐ

Klaksvíkar Sjúkrahús tlf. 455463
Landssjúkrahúsið tlf. 304522
Suðuroyar Sjúkrahús tlf. 371133
www.gevidblod.fo

I EINUM SAMFELAG HAR TEY VEIKASTU HAVA TAÐ GOTT, HAVA ØLL TAÐ GOTT

WWW.JAVNI.FO

JAVNI


## VESTFALLSKYRRINDI

12. november: Tendring
14. november: Mánin næstur jørðini
19. november: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. nov | 10.31 | 23.00 | 09.31 | 22.00 | 09.46 | 22.15 | 00.02 | 12.31 | 01.02 | 13.31 | 08.46 | 21.15 | 07.46 | 20.15 | 10.46 | 23.15 | 11.46 | — | 10.16 | 22.45 | 11.31 | — |
| 18. nov | 11.26 | 23.53 | 10.26 | 22.53 | 10.41 | 23.08 | 01.00 | 13.26 | 02.00 | 14.26 | 09.41 | 22.08 | 08.41 | 21.08 | 11.41 | — | 00.15 | 12.41 | 11.11 | 23.38 | 00.00 | 12.26 |
| 19. nov | — | 12.31 | 11.31 | — | 11.46 | — | 01.53 | 14.31 | 02.53 | 15.31 | 10.46 | 23.24 | 09.46 | 22.24 | 00.08 | 12.46 | 01.08 | 13.46 | — | 12.16 | 00.53 | 13.31 |
| 20. nov | 01.09 | 13.45 | 00.09 | 12.45 | 00.24 | 13.00 | 03.09 | 15.45 | 04.09 | 16.45 | — | 12.00 | 11.00 | 23.36 | 01.24 | 14.00 | 02.24 | 15.00 | 00.54 | 13.30 | 02.09 | 14.45 |

5 707265 100036 >